# Hatta var fantastiskt

**Mortan úr Hørg, sum skeyt týdningarmikla 1-0 málið á Sevmýri, helt, at nú kunnu vágbingar kenna seg tryggar**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Enn eru ikki allar súður syftar, men tað skal skjótt vilja heilt illa til, um VB skal flyta beina leið niður í aðru deild.

Sigurin á TB ber við sær, at VB nú hevur tvey lið undir sær, og tá vit tosaðu við annan av málskjúttunum, Mortan úr Hørg, kundi hann illa dylja, hvussu fegnir teir vóru um hetta.

- Hatta var bara heilt fantastiskt. Trýstið á okkum hevur verið øgiliga stórt seinastu tíðina, men nú haldi eg, at vit kunnu draga andan nakað léttari. Og karmarnir kring dystin vóru eisini av teimum bestu. Har vóru fólk úr allari oynni til staðar, og stemningurin sum heild var heilt ótrúligur.

Spurdur, hvørt hann nú roknar við, at vágbingarnir eru bjargaðir, sigur Mortan, at nú skal tað vilja heilt illa til.

- Bæði TB og GÍ skulu vinna ella spæla javnt, um tey skulu taka okkum aftur. Sjálvandi gera vit ikki av, hvussu aðrir dystir enda, men eg rokni ikki við, at GÍ ger tað heilt stóra á Skála. Hinvegin kann TB væl gera ein vørr móti ÍF, ið ikki hevur so nógv at spæla fyri. So alt kann henda, men eg rokni í øllum førum ikki við, at vit fara beinleiðis niður.



*Fagnaðurin var øgiligur, tá Mortan úr Hørg stutt inn í seinna hálvleik legði VB á odda*

Mynd: Áki Bertholdsen

TB-VB 0-2 (0-0):

# VB tók kjansin – tá TB ikki tók av

**Fyrstu minuttirnar høvdu vertirnir møguleika at punktera dystin fullkomuliga. Men teir tóku ikki av, og so tók VB kjansin, tá teir fingu hann**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*Hóast nógv stóð upp á spæl hjá grannunum báðum, so gjørdist talan um hampuliga reint spældan dyst, har intensiteturin tó alla tíðina var høgur*

Mynd: Áki Bertholdsen

Tað var sjón fyri søgn, at byrðurin hevur verið TB til vildar seinastu vikurnar. Móti einum VB-liði, sum fyri tað nógva var merkt av tungu gongdini, sum liðið hevur verið í, søkti TB frá fyrsta bríksli á VB-málið, og einar tvær ferðirnar mundu tey flestu eisini síggja bóltin í meskunum. Men fyrru ferðina varð skotið við síðuna, og seinnu ferðina varð nølað ov leingi, og so spurdist einki burturúr.

Tað gav spakuliga VB møguleikan at koma aftur í dystin, og tó at teir ikki fingu spælt seg til nakra yvirvág, so gekk tað nú meira javnt fyri seg. Tað var kanska TB, sum framvegis trýsti meira, men talan gjørdist ikki longur um teir heilt stóru møguleikarnar.

**Vøkur langskot avgjørdu**

Eftir steðgin royndu vágbingar at trýsta eina løtu, og talan gjørdist eisini um einstakar vandastøður. Men tá málið kom, so var tað meira eitt úrslit av flottum skot-teknikki, heldur enn góðum spæli.

Vágbingar spældu seg spakuliga niðaneftir, og tá bólturin varð sendir til Mortan úr Hørg, smekkaði hann til fyrstu ferð. Og í mun til landsdystin móti Kypros, so smoygdi bólturin sær hesa ferð røttu megin samankomingina, og so var fagnaðurin øgiligur. Ikki minst kring vøllin, sum mundi leggja rygg til eina tí størstu áskoðarafjøldina í langa tíð á Sevmýri.

TB royndi at trýsta seinastu løtuna. Og Óli Johannesen varð eisini sendir niðan móti endanum. Og so gekk tað, sum tað so ofta ger, tá nógv fólk verður tveitt fram. Vágbingar spældu seg til einstakar kontra-møguleikar, men enn einaferð skuldi eitt vakurt skot til, áðrenn úrslit spurdist burturúr. Hesa ferð var tað Dánjal Johan Joensen, sum langaði til. Fjarstøðan var kanska ikki heilt so stór, sum hon var tað hjá Mortani, men úrslitið var neyvt tað sama. 2-0 til VB, sum nú av álvara kendi léttan, sum teir ikki hava kent í fleiri mánaðir. Enn er kanska ikki sloppið, men tað skal skjótt vilja heilt illa til, um tilveran í deildini skal hóttast. Og sjálvir hava vágbingarnir so eisini møguleika at seta tingini upp á pláss, tá EB/Streymur vitjar í seinasta umfarinum.

**Ein møguleiki eftir**

Hjá TB var talan hinvegin um eitt bakkast av teimum stóru. Liðið hevði annars vunnið seg upp úr botninum við fínum avrikum móti GÍ og Skála, men eina løtu mundi tað kennast, sum varð hetta arbeiðið gjørt til einkis við tapinum sunnudagin.

Hinvegin, so merkja teir báðir fyrrnevndu sigrarnir, at TB enn hevur møguleikan. Vil væl til, so er bara ein javnleikur í seinasta dystinum í Fuglafirði til at liva við hjá TB, sum tá kemur ájavnt GÍ stigum. Og í innanhýsis uppgerðum eru tvøramenn betri fyri enn teir gulu úr Gøtu, sum tá fara at spæla á Skála, har heimaliðið enn hevur FM-møguleikan at spæla fyri.

## Fakta um dystin

**TB–VB 0-2 (0-0)**
**0-1** Mortan úr Hørg, 53.
**0-2** Dánjal Johan Joensen, 89.
**Dómari:** Petur Reinert
**TB:** Predrag Markovic – Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen – Allan Poulsen (Allan Smedemark, 75.), Aleksandar Jovevic, Einar Petersen, Jón Tórur Holm (Dan Mortensen, 58) – Hallur Christiansen (Mortan Enni, 62.), Dejan Tomic
**GK:** Alaxandar Jovevic, Jón Tórur Hlom, Predrag Zivkovic
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Súni úr Hørg, Anders Sørensen, Jákup F. Olsen – Poul N. Poulsen, Milan Kulic, Edvard Blé – Dan Djurhuus, Nenad Zivanovic, Palli Augustinussen (Dánjal Johan Joensen, 84.)
**GK:** Mortan úr Hørg

# Hava ikki mist mótið

**TB-liðskiparin heldur, at støðan fyri einum mánaði síðani sá svartari út, enn hon ger nú**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað var ein vónsvikin TB-liðformaður, sum vit fingu orðið á, tá VB mest sum hevði staðfest sína støðu í Formula-deildini við sigrinum á Sevmýri.

- Hatta var so absolutt ikki ætlanin hjá okkum. Ikki tí, vit byrja dystin øgiliga væl, og vit hava eisini einar tríggjar møguleikar, harav tveir í øllum førum eiga at geva mál, staðfesti Óli Johannesen.

- Men so seta vit ferðina nakað niður. Vit verða kanska varnari, tí málið ikki kemur, men sum heild haldi eg, at vit høvdu fult tamarhald á støðuni. Teir skapa sum so ikki nakran veruligan møguleika, men so fáa teir eitt dreymamál, tá Mortan smekkar til. Og so mugu vit satsa. Tað gera vit eisini heilt nógv móti endanum, og um vit tapa 1-ell 2-0 kann sum so gera tað sama.

Men hava tit nú mist mótið í botnstríðnum?

- Nei, slettis ikki. Sjálvandi er tað absolutt seinasta útkall, tá vit fara til Fuglafjarðar, men hinvegin haldi eg, at støðan sær betri út nú, enn hon gjørdi fyri einum mánaði síðani. Tá høvdu vit fimm stig upp til næstu liðini, og vit høvdu ikki vunnið í einar fýra mánaðir. Megna vit at halda fast um spælið, sum vit hava sýnt seinastu tíðina, so ivist eg ikki í, at vit kunnu røkka sigrinum, og so mugu vit bara vóna, at hini úrslitini laga seg rætta vegin, staðfesti Óli Johannesen at enda.